# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um prostatakrabba

## Sjúkueyðkenni, ið geva illgruna um prostatakrabba

Avmarkaður prostatakrabbi gevur ofta ikki sjúkueyðkenni.

Menn >40 ár, ið ynskja at fáa tikið PSA uttan sjúkutekin, kunnu fáa hetta gjørt. Um fyrsta PSA er hækkað, skal nýtt PSA takast eina viku seinni. Um tað eisini er hækkað skal ávísast til útgreining fyri prostatakrabba (tá verður framd MR prostatakanning).

Um onnur PSA máting er normal, so skal støðan endurmetast, áðrenn evt. ávísing verður gjørd.

Um PSA blóðroynd verður bíløgd í samráð við sjúklingin, eigur viðkomandi at verða kunnaður um, at hetta kann viðføra útgreining við m.a. MR skanning og evt. vevnaðarkanning av prostata.

PSA-máting hjá monnum eigur at verða gjørd um eitt ella fleiri av niðanfyristandandi punktum er til staðar

- Tekin til LUTS
- Ikki normal palpatión av prostata (harður, óregluligur, asymmetriskur)
- Menn > 45 ár við sjúkueyðkennum, ið geva illgruna um prostatakrabba, sum t.d.
  * perineal pína
  * lymfødem sv.t. genitalia og undirekstremitetir
  * pína í beinagrind, t.d. í ryggi og/ella akslum
  * fleiri hendingar við hæmospermi
- Menn > 40 ár við ávístum BRCA2-ílegubreki
- Familiært disp. menn > 45 ár í góðari almennstøðu

Um fyrsta PSA er hækkað, eigur nýtt PSA at verða tikið eftir einari viku at staðfesta, at tað er enn hækkað.

Við hækkaðum PSA (x2) og/ella malignitetssuspektum prostata, skal sjúklingurin ávísast til krabbameinsútgreining. Áðrenn ávísing eigur læknin at hugsa um almennstøðu, komorbiditet og væntaða restlivitíð.

Fylgjandi er viðkomandi fyri ávísing:

- PSA virði samanhildið við aldur, sí DaProCa. Um PSA er lætt hækkað, skal kontroll máting fyriliggja og UVI vera útilokað
- Relevant biokemi - m.a. PSA, kreatinin, Hgb og basisk fosfatasa
- Rektal eksploratión
- Sjúkueyðkenni
- Aðrar viðkomandi sjúkur
- Heilivágur
- Metan av almen støðu

Av tí at flestu menn við illgruna um prostatakrabba skulu hava framda MR skanning av prostata sum fyrstu kanning, skulu ymisk viðurskifti vera greið, tá ávíst verður í Cosmic. MR kanningin verður bíløgd av krabbamóttøkuni.

Biðið verður um: Hædd og vekt. Familiær disp. til prostatakrabba (hvussu). Metalimplantat/protesu (ja/nei), nýrasjúka (ja/nei), kontrastallergi (ja/nei), diabetes (ja/nei), klaustrofobi (ja/nei). eGFR. Sjálvhjálpin (ja/nei).

## Handfaring av recidiv ella progressión

Við illgruna um recidiv hjá sjúklingum, som hava fingið kurativt intenderaða viðgerð móti prostatakrabba, skal sjúklingurin bjóðast ávísing til krabbameinsútgreining fyri prostatakrabba
Sjúklingar við prostatakrabba, ið eru í active surveillance ella watchful waiting, skulu ikki í nýtt forløb, men ávísast til urologiskt ambulatorium við illgruna um progressión

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um prostatakrabba" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic.
Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026